FILMSTEIGURIN

# Get over it

Berke helt, at hann seinasta árið á high school fór at verða genialur. Hann gekk saman við »the girl of his dreams«, Allison, sum hann hevur havt serligan tokka til, síðani tey vóru blæubørn. Alt gekk uppá stás, tey vóru heitasta parið á skúlanum, og Berke kendi á sær, at fyri fyrstu ferð í lívinum gekk alt sum eftir ánni. Men hann fór heilt skeivur. Allison fór frá honum, og gongur nú saman við lekrasta dreinginum á skúlanum. Berke er púra sjúkur, øvundsjúkur og hevur bert ein tanka í høvdinum: hvussu hann skal vinna Allison aftur. Felix og Dennis stríðast av øllum alvi at fáa vinin á rættkjøl og á aðrar tankar (nýggjar gentur) eftir, at Allison hevur gjørt tað liðugt. Av øllum letur tað til at gerast besta vinkonan hjá lítlusystrini (Kirsten Dunst),





sum heilt óvæntað verður tann, sum hjálpir honum at koma yvir brotið.

Kirsten Dunst (Kelly) hava vit júst upplivað í filminum »Bring it on«. Hon er bert 19 ára gomul, men hevur longu verið við í nógvum filmum. Sum seks ára gomul var hon við í Woody Allen filminum »New York Stories«. Síðani hevur hon verið við í ótali av filmum og sjónvarpsrøðum. Í »Get over it« roynir hon seg eisini sum sangara.

Ben Foster hevur leiklutin sum Berke. Hann er føddur í 1980 og hevur síðani síðst í 90-unum verið við í sjónvarpsrøðum og filmum. Colin Hanks, sum er sonur Tom Hanks, hevur leiklutin sum Felix. Hann er føddur í 1977 í Kalifornia. Eisini hann hevur verið við í nógvum filmum.

Tað er Tommy O'Haver, sum hevur leikstjórnað filmin »Get over it«. Fyrsti filmurin hann leikstjórnaði varð »Billy's Hollywood Kiss« frá 1988, sum er nógv róstur av atfinnarum. »Get over it« hevur eisini fingið nógva góða umtalu, eitt nú fimm stjørnur frá blaðnum Vi unge.





**Frumsýning**
Fríggjadagin 19.10. kl. $19^{00}$ Leygardagin 20.10. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 21.10. kl. $20^{15}$

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




**Undanfrumsýning**
Fríggjadagin 19.10. kl. $23^{30}$




Fríggjadagin 19.10. kl. $23^{00}$ Leygardagin 20.10. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 21.10. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 19.10. kl. $21^{15}$ Leygardagin 20.10. kl. $19^{00}$
Leygardagin 20.10. kl. $23^{30}$ Sunnudagin 21.10. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 21.10. kl. $22^{30}$




Fríggjadagin 19.10. kl. $20^{30}$ Leygardagin 20.10. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 21.10. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 19.10. kl. $18^{30}$ Leygardagin 20.10. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 21.10. kl. $17^{30}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu








Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin -tað loysir seg

i Sosialurin

Les í býin hvønn hósdag !


# Borurin nærkast týðandi máli

OLJULEITING
*Jan Müller*

Tað gongur væl at bora hjá Amerada Hess samtakinum, men enn hevur Sovereign Explorer ikki gjørt nakað oljufund. Sosialurin skilur, at tað longu eru boraðir meira enn 3000 metrar og eftir resta einir 800 metrar. Boringin er gingin skjótari enn væntað tvs. at har hava ikki verið trupulleikar við basalti ella øðrum. Høvuðsmálið hjá Hess nærkast í hvørjum Gongur sum nú verður borurin frammi á einum av teimum mest týðandi høvuðsmálunum einaferð í næstu viku. Tað fréttist, at kjarnur eru tiknar upp men einki fréttist um úrslitið av hesum kjarnuroyndum. Eftir tí sum skilst í oljuverðini hevur boringin enn ikki havt við sær nakað sum líkist einum fundi. Men tað er so heldur ikki í andsøgn til vónirnar at finna olju, tí tær snúgva seg serstakliga um endaliga málið umleið 3800 metrar niðri í undirgrundini.

Gitingar eru tó um einstøk oljuspor, men tað fáa vit ikki váttað. Okkurt bendir tó á, at eisini í hesi triðju boringini við Føroyar eru staðfest oljuspor. Men tað er tó ikki nóg mikið til at geva vónir um verulig oljufund. Tað mugu vit so bíða eftir í hvussu er nakrar dagar aftrat. Boringin byrjaði 20. september, so í morgin er ein mánaði farin. Helst verður boringin liðug nakað fyrr enn mett tvs. umleið 1. november.








Í Býin
- hvønn hósdag

